# Gamla kommodan fær nýtt andlit

Vit heittu á Lindu Laksáfoss, dekoratør, um at gera gomlu kommoduna meira spennandi.

**Tekst:** Rigmor Dam
**Myndir:** Jens Kristian Vang og Álvur Haraldsen

Linda hevur málað gomlu 80'ara kommoduna við blankari máling. Hon hevur dekuperað toy á síðurnar á kommoduni, málað handtøkini og lakkað tey aftaná.

Annað hugskot er at dekupera ella mála smáar myndir av klædnapløggum á skuffurnar, so sum hosur og blusur.

At dekupera merkir snøgt sagt at líma eina mynd á ein lut og so smyrja fleiri løg av sonevndum dekupagulakki á. Hetta gevur eitt blankt og slætt úrslit.


Linda Laksáfoss málar kommoduna við blankari máling.



Gamla kommodan hevur brúk fyri einari andlitslyfting.





Knobbarnir eru málaðir hvítir og ein blóma er tekna á teir.


Toy er dekuperað á síðurnar á kommoduni.